ALMANNA- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF SOCIAL AFFAIRS AND CULTURE

Umhvørvismálaráðið
Gongin 7
FO 100 Tórshavn

Dagur: 20. februar 2024
Mál: 24/03818-2
Viðgjørt: HP

Almanna- og mentamálaráðið hevur móttikið *uppskot til løgtingslóg um broyting í barsilslógini* til ummælis. Almanna- og mentamálaráðið hevur ongar viðmerkingar til lógarbroytingina.

Í partinum um fíggjarligar avleiðingar skulu vit gera vart við setningin "*Viðmerkjast skal, at partur av hesum foreldrum sannlíkt hava fingið almannaveiting, ið telur við í útrokningargrundarlagið til barsil, og fáa tí longu eitt hægri útgjald enn við hesi broytingini.*" Vit skilja, at her verður víst til fyribils uppihaldsveiting sambært løgtingslóg um almannatrygd og tænastur. Fyribils uppihaldsveiting er fevnt av undantakinum um gjaldsskyldu til barsilsskipanina (§ 18, stk. 1, nr. 2 í barsilslógini), og ein persónur, ið móttekur fyribils uppihaldsveiting, rindar tí ikki til barsilsskipanina, eins og viðkomandi heldur ikki hevur rætt til gjald frá barsilsskipanini í sambandi við barsilsfarloyvi. Hetta hevur tó ikki týdning fyri málið, tí ein persónur, ið móttekur fyribils uppihaldsveiting í tíðarskeiðinum beint áðrenn farið verður í barsilsfarloyvi, lýkur tí eisini treytirnar fyri at fáa fyribils uppihaldsveiting í farloyvistíðarskeiðinum.

Vinarliga

Heri Petersen
fulltrúi